gult22 cyan22 magenta22 svart22



# Øðrvísi skúladagar í Gøtu

**Týsdagurin 12., mikudagurin 13. og hósdagurin 14. juni vóru øðrvísi enn aðrir skúladagar hjá børnunum við Gøtu skúla. Hesar dagarnar fingust øll børnini við ávís evni.**

*Evnini vóru hesi:*

6. og 7. flokkur: Á flot. Kanning og viðgerð av veiðini, innvøli o.ø.

1.–7. flokkur: Hvat finna vit í fjøruni. Kunning. Innsavning. Kanning og greining av tí funna.

1.–7. flokkur: Hvussu nýta vit tað, vit finna í fjøruni, í listarligum høpi.

1.–5. flokkur: Gomul spøl.

Týsmorgunin kl. 8 stevndu fýra bátar mannaðir við 6. og 7. floks næmingum út av Gøtu. Í hvørjum báti var ein vaksin maður, ið skuldi leggja teimum lag á. Næmingarnir skuldu læra at halda snøri og royna fiskieydnuna í 2 tímar.

Kl. 10 fór næsta holdið avstað.

Veiðan var koyrd í skúlan, og har sluppu næmingarnir at kanna veiðuna, kanna hvat fiskurin hevði í maganum, at skera flak o.a.

Ikki kann sigast annað, enn at eydnan var við teimum, tí tá dagurin var liðugur, fingu næmingarnir eini 2 kók í part heim við sær.

Næmingarnir í 1., 2. og 3. flokki lærdu at spæla ymisk spøl, ið vanlig vóru fyrr, men sum nú eru avløgd. Hetta gekk fyri seg í skúlagarðinum. 4. og 5. flokkur fóru yvir á Skálafjørðin at kanna lívið í fjøruni og at savna inn ymiskt tilfar, ið tey dagin eftir skuldi nýta til gerð av ymsum prýðislutum.

Mikumorgunin fóru 1., 2. og 3. flokkur og 6. og 7. flokkur í fjøruna at kanna og at savna ymiskt tilfar saman, og heimafturkomin fóru tey at greina, skola, reinsa og turka tilfarið, ið skuldi nýtast dagin eftir, meðan 4. og 5. flokkur arbeiddu í skúlanum við at gera ymiskt prýði og prýðislutir.

Hósdagin evnaðu 1., 2. og 3. flokkur og 6. og 7. flokkur prýðislutir, meðan 4. og 5. flokkur lærdi gomul spøl.

Ikki kann sigast annað, enn at næmingarnir fingu væl burturúr, og at hetta vóru tríggir spennandi og læruríkir dagar, og stuttligt var at síggja, hvussu hugagóðir og áhugaðir næmingarnir vóru.







# Hittast fyri fyrstu ferð í 30 ár

STUDENTAR HITTAST

Hetta er tann tíðin, tá "gamlir" floksfelagar hittast at minnast gamlar skúladagar. Tað er tó heldur óvanligt, at floksfelagar ikki hittast aftur fyrr enn 30 ár eftir lokna próvtøku. Soleiðis er tað m.a. við 3 G-arunum á Studentaskúlanum í Hoydølum, sum vórðu studentar í 1971.

Nú hava teir so tikið seg um reiggj og sett hvørjum øðrum stevnu í Hoydølum komandi leygadag. Á myndini eru næmingarnir í teimum trimum flokkunum, sum vórðu lidnir í 1971. Mong kend andlit, tó at onkur teirra ikki eru at kennast aftur í dag. Teir, sum skipa fyri hugnaløtu og samkomu í Hoydølum í ovurmorgin, vilja fegnir koma við eini seinastu heilsan til floksfelagarnar um at vera við. Ringið til Birgir á 318575 ella til Jan á 311873.

gult23 cyan23 magenta23 svart23




Námsliga útbúgvingin
Vilt tú vera pedagogur?

Nyggjur flokkur verður tikin upp eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf 313501). Teldupostur: flsk@flsk.fo ella á heimasíðu skúlans: www.flsk.fo

Skrivstovan er opin kl. 8.00-16.00.

Treytirnar fyri upptøku á námsligu útbúgvingina eru, at umsøkjarin umframt at hava gingið 9 ár í skúla hevur staðið HF-prógv, studentsprógv, hægri handilsskúlaprógv, hevur lærlingaútbúgving, ella kann prógva samsvarandi kunnleika.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur starvast í dag- ella bústovni í minsta lagi 1/2 ár.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 28. juni.

Námsliga útbúgvingin
– Ein útbúgving fyri lívið

Læraraútbúgvingin
Vilt tú vera lærari?

Nú er greitt at søkja á Læraraskúlan eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf 313501) teldupostur: flsk@flsk.fo ella á heimasíðu skúlans www.flsk.fo

Skrivstovan er opin kl. 8.00-16.00.

Treytin fyri upptøku á læraraútbúgvingina er studentsprógv, HF-prógv ella prógv á líknandi stigi.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 28. juni.

Læraraútbúgvingin
– Ein útbúgving fyri lívið

SMS leitar eftir
húsi í Tórshavn
til tvey vaksin og eitt barn.
Húsini mugu verða klár at flyta inn í innan 1. august 2001.
Áhugaði verða vinarliga biðin um at ringja til tel. 22 13 99.
SMS

máling & gólv
Johnstonés
Stormshield
Betonmáling
10 l.
Bert 499 kr.
Vit hava eisini Johnstonés
Træverju
5 l.
399 kr.
máling & gólv
við Landavegin
Tlf. 316066

1. juli

Tann føroyski Hárfríðkanarskúlin
Tann 01.09.01 taka vit 3 næmingar inn.
1. árið fevnir um:
2. árið er framhald og fevnir um:
Tann føroyski Hárfríðkanarskúlin
Niels Finsensgøta 10
110 Tórshavn





Scania P93 til sølu





Árg. 1991. Við nyggjari lift. Hevur isoleraðan kassa (Norfig), og er í góðum standi. Til sølu fyri 95.000 kr. v/mvg

Tlf. 314728 ella 219728

i
Sosialurin

Í BÝIN